## Svimjilandsdystur í november

Tann 28. november verður svimjihøllin í Gundadali í Havn karmur um svimjilandsdyst millum Ísland og Føroyar. Átta svimjarar av hvørjum verða á hvørjum liði, og í frá klokkan 16 til 18 fara hesi at kappast um, hvat landið hevur bestu svimjararnar. Sambært 3-2 í Sjónvarpinum, verður landsdysturin vístur beinleiðis.



## Jákup var yngstur

Í seinsta vikuskiftisblað okkara var samrøða við Finn Justinussen úr Víkingi, sum í ár vann gylta skógvin sum toppskjútti í bestu føroysku mansdeildini. Í greinini varð skrivað, at Finnur, sum er 20 ár, er yngsti toppskjúttin nakrantíð í bestu føroysku deildini, men hetta er tó ikki heilt rætt. Jákup á Borg var toppskjútti í bæði 1998 og 1999. Tá var Jákup ávíkavist 18 og 19 ára gamal, og var hann tí yngri, enn Finnur Justinussen var, nú hann tók ímóti gylta skógvinum.

# Nú skal tann sterkasti finnast

**Leygardagin klokkan 18.30 byrjar kappingin, har tað ræður um at finna sterkasta mannin í landinum**




Jákup Mørk

Níggju sterkir menn eru, sum fara at kappast í kappingini, har bilar skulu flytast, sekkir syftast og tungar vektir lyftast.

Tað eru longu fleiri mánaðir síðani, at fyrstu stigini til kappingina vórðu tikin, og síðani hava sterku menninir fyrireikað seg sjálvar best møguligt. Tveir teirra eru búsitandi í Danmark, og hava teir eisini vant har, meðan hinir seks regluliga hava møtt til venjingar í høllini hjá Havnar Timburhandli, har kappingarútgerðin hevur staðið, umframt at venjingar í Yndi eisini hava verið á skránni.

Sjálvir siga teir, at teir hava saknað eina slíka kapping, ið ikki hevur verið fyriskipað, síðani Regin Vágadal var í vælmaktini. Tá gjørdist kappingin eisini byrjanin til altjóða gjøgnumbrotið hjá Regini, men enn er tað ikki so, at sterkasti maðurin í Føryum vinnur sær atgongd til líknandi kapping uttanlands.

Undan kappingini hitar Rókur Jákupsson Jacobsen áskoðararnar upp, og í steðginum – t.e. eftir fyrstu tríggjar kappingarnar – verður mótasýning við undirklæðum frá Siri.




**Seinastu mánaðirnar hava sterku menninir vant dúgliga í høllini hjá Havnar Timburhandli**

Mynd: Jens Kr. Vang

### FAKTA

**Kappingarnar:**

- Lyfta eina stammu, sum vigar 90 kilo, oftast møguligt upp um høvd í 60 sekund
- Ganga 14 metrar við einum bili upp á tíð
- Halda 20 kilo tungum dekki í strektum ørmum longst gjørligt
- Bonkpress, 140 kg, oftast gjørligt
- Renna við fimm sekkum á 100 kg og tveita hesar upp á plattar
- Halda tveimum bobbens á 105 kg í longst møguliga tíð

### Luttakararnir:

- Sámal Johannes Hansen
- Herman Hermansen
- Gunnar Grækarisson
- Bárður Poulsen
- Heri Vestergaard
- Finnur Poulsen
- Jákup Petur Djurhuus
- Torstein Madsen
- Bogi Hammer

# Grannauppgerð í Havn



**Saman við StÍF hóttir Neistin longu nú við at skræða seg leyst frá restini. Men Kyndil vísti við sigrinum í Vestmanna, at teir eisini vilja spæla við**

**Tað líkist eini uppgerð, sum longu nú kann skilja oddin frá hinum, tá Kyndil tekur móti Neistanum sunnudagin**




Jákup Mørk

Bara tveir dystir eru á skránni í hondbóltslandskappingini um vikuskiftið. Triði dysturin hetta umfarið verður spældur mikukvøldið, og kvinnukappingin liggur still, tí føroyska U-landsliðið hjá kvinnum spælir móti Grønlandi.

Í Havn verður grannauppgerð millum Kyndil og Neistan. Kyndil byrjaði árið við at tapa móti StÍF, men seinasta sunnudag vunnu teir tepurt í Vestmanna, og tað er væl tekin um, at roknast kann við teimum grønu í vetur.

Neistin hevur hinvegin vunnu teir báðar fyrstu dystirnar, og hevur liðið tí møguleika at leggja seg einsamalt á odda.

Og á Skála spæla StÍF og VÍF tað, sum má metast sum nýklassikarin í føroyskum hondbólti. Vestmenningar hava ofta havt tað trupult á Skála, og tað er ikki líkt til, at hetta verður stórt øðrvísi móti einum StÍF-liði, sum hevur víst øgiliga styrki fyrstu tveir dystirnar í ár.

### Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**

***Atlantic Airways-kappingin***

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 11.10 | 16.00 | Kyndil-Neistin |
| 11.10 | 16.00 | StÍF-VÍF |

**U-landslið, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 11.10 | 14.30 | Føroyar U19/U21-Grønland *(Í høllini á Hálsi í Havn)* |